

*Formaðurin í fólkatinginum Christian Mejdahl, ið er føddur á Tvøroyri, ynskir Anfinni tillukku við valinum.*



*- Vit kunnu gott samstarva, men vit hava ikki tosað um tað enn, sigur Høgni Hoydal. Hann heldur, at teir hava nógv felags mál.*

gera føroysk viðurskifti, men eg eri har bert tá tær arbeiða við evnum, ið viðvíkja Føroyar, sigur Anfinn.

Norðuratlantsbólkinum hevur Fólkaflokkurin ikki verið áhugaður í.

- Eg havi sagt tað fyrr, at Norðuratlantsbólkurin liggur ov langt til vinstru til mín. Teirra samstarv við Einheitslistan er ikki nakað fyri meg, og eg haldi heldur ikki, at tað arbeiði, sum Norðuratlantsbólkurin brúkar sína orku uppá, hevur nakað við fólkatingsarbeiði at gera. Kanningar og upplýsing kann eins væl gerast heima í Føroyum, sigur Anfinn Kallsberg.

Høgni Hoydal er als ikki samdur í hesum, men heldur tvørturímóti, at Norðuratlantsbólkurin eigur at samstarva við føroysku mynduleikarnar til dømis um at kannað viðurskiftini hjá føroyingum í Danmark ella, sum ætlanin er í næstum, at gera eina kanning av peningarenslinum millum londini í ríkisfelagsskapinum. Samstarvið við Einheitslistan er tekniskt og ikki ábending um, at Norðuratlantsbólkurin liggur so langt til vinstru, sigur hann.

Hóast føroysku umboðini ikki eru samd um leiklutin á Christiansborg, er ikki óhugsandi, at teir kunnu samstarva.

- Eftir valstríðnum at døma hava vit fleiri felags mál, millum annað at syrgja fyri, at føroyingar ikki avmarka seg við eini heimildarlóggávu. Vit kunnu sjálvandi samstarva, men vit hava ikki tosað um tað enn, sigur Høgni Hoydal.

Teir siga seg somuleiðis báðir leggja serligan dent á at varpa ljós á ríkisrættarligu støðu Føroya, nú Danmark fer at viðgera nýggja ES-sáttmálan.


TEMPUR hjá IDEmøblum




÷15%
hósdag - fríggjadag - leygardag

VIKUSKIFTIS TILBOÐ
framúrskarandi Tempur madrassur

Við Tempur madrassuni fært tú ein róligari og djúpari svøvn, tí tú vendir tær munandi minni um náttina. Tað gevur tær meiri yvirskot at njóta tað, sum er vert at njóta.

Nýt hetta høvið og fá tær kollveltandi madrassuna fyri minni kostnað hetta vikuskifti.



TEMPUR RÁDGEVI VITJAR
Leygardagin 26. februar millum klokkan 10 og 14 ber til at fáa góð ráð og vegleiðing frá Tempur ráðgevanum, ið vitjar Idé møblar

*Royn okkara rúmdarkliva og droym um ein betri svøvn.*

Tempur er eitt toyggiligt, hitaávirkiligt evni av smáum, opnum rúmum, ið fylgja umhvarvinum hjá kroppinum. Opnu rúmini lata luft streyma gjøgnum madrassuna, so kropshitin verður varðveittur. Madrassin flytir seg varliga við kropsins landslagi, so fullkomin stuðul verður givin, uttan at tað elvir til móttrýst.

TEMPUR
MADRASSUR OG PÚTUR SUM LÆTTA UM
www.tempur.dk

IDEmøblar
Uppi á Hálsi, Tórshavn, Tel 354680

| | |
|---|---|
| Mánadag - hósdag | 9.00 - 17.30 |
| Fríggjadag | 9.00 - 18.00 |
| Leygardag | 10.00 - 14.00 |